# SÍ kann geva Mjølnir gullið

**Megna sørvingarnir at skal ÍF, fer gullið av álvara at venda móti Klaksvíkini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Menninir hjá Mjølni hava í løtuni dystarbólt, tá tosað verður um FM-heitið í flogbólti. Hendan tryggjaðu teir sær við sigri á ÍF fyri tveimum vikum síðani, og nú bíða tey í Klaksvík í spenningi, um eisini SÍ fer at hjálpa teimum í roynd-unum at vinna gullið.

Sørvingar taka á heimavølli móti ÍF, og er tað nakað lið, sum kann órógva oddastríðið, so er tað helst júst SÍ. Higartil hava avrikini hjá teimum verið nakað óstøðug, men eru teir á toppinum, so kann væl vera, at teir gera ein ordans vørr. Á heimavølli plaga teir eisini at vera sterkir, og so hevur liðið eisini nakað at hevna, nú teir so dyggiliga vóru við undirlutan í steypafinaluni móti júst ÍF.

Í aðrar mátar tykist talan ikki vera um tann stóra spenningin hetta vikuskiftið.

Hjá monnunum hevur Mjølnir útidyst móti Fleyr, og her er einki at ivast í, at stigini fara norðureftir.

Tað fara tey helst eisini í kvinnudeildini, tá Mjølnir vitjar hjá KÍF, og í seinasta dystinum verður flogið hjá stigunum helst móti suðuri, tá TB tekur ímóti botnliðnum, Fleyr.

# Fótbóltur á bygd (FÁB)

**Í oktober mánaði í 2003 var farið undir eitt nýtt fótbóltsátak í Norðoyggjum. Fótbóltsvenjarar í Klaksvík settu sær fyri at skipa fyri reglunligum fótbóltsvenjingum á Viðareiði um veturin, og átakið fekk navnið Fótbóltur á bygd (FÁB)**

FÓTBÓLTSVERKÆTLAN
*tíðindaskriv*



*Nú veðrið sjáldan er til vildar, verður fyri tað mesta vant innandura í fimleikahøllini hjá Skúlanum á Viðareiði*

Bakgrundin fyri FÁB skal finnast á einum fundi, sum Klaksvíkar Ítróttarfelag helt á Hotel Norð í august mánaði í 2003. Ábyrgdarfólk í felagnum fundaðust um viðurskifti innan felagið og fótbólt, og tá kom venjing norðanfyri tunnlarnar upp at venda.

Fyrireikingarnar fóru í gongd fyri at gera álvara av hugskotinum, og í oktober mánaði varð lagt til brots við venjing ætlað dreingjum í aldrinum frá 9 til 15 ár. Undirtøkan fyri venjingunum hevur verið stór og støðug, og upp í 20 dreingir eru møttir til onkra venjing.

### Endamálið

FÁB er eitt nýtt átak, og endamálið við venjingini er:

1) At menna leikararnar við tekniskari venjing.
2) At menna medviti hjá tí einstaka leikaranum um liðítróttin.
3) At læra leikararnar at kenna ábyrgd og taka hana.

### Teknikkur í miðdeplinum

Teknisk venjing er í miðdeplinum hjá FÁB. Spælararnir fáa frálæru í temjingum, avleveringum, fintum, driblingum og annað, og teir sleppa at royna og menna sínar førleikar við fjølbroyttum øvilsum og venjingum.

Venjararnir royna støðugt at minna dreingirnar á, at skulu teir veruliga menna seg sum spælarar, mugu teir eisini venja sjálvir. Teir kunnu fáa vegleiðing, frálæru og góð ráð til FÁB-venjingarnar, men teir kunnu síðani sjálvir venja ymsu teknikkirnar. Tað kann gerast allastaðni – í túninum, í bønum, á vøllinum ella aðrastaðni. Bólturin og fótbóltsgleðin má vera í miðdeplinum, skulu teir menna seg sum fótbóltsspælarar.

FÁB-venjingin á Viðareiði hevur verið einaferð um vikuna, og tað hevur verið sjón fyri søgn, at spælararnir hava gjørt framstig í vetur. Teir taka venjingina í álvara, møta til tíðina, teir flestu hvørja ferð, og annars geva teir avboð, tá ið teir ikki kunnu venja. Tað hevur gjørt átakið hugaligt hjá teimum, sum varða av tí.

### Nær verður vant?

FÁB hevur venjing hvønn mikudag seinnapart. Vant verður á vøllinum á Viðareiði ella í fimleikarhøllini í skúlanum, tá ið umstøður ikki eru at vera úti. Venjingarnar byrjaðu í oktober mánaði 2003, og tær halda fram til hálvan mars, tá ið øll liðini hjá KÍ eru byrjað at venja aftur.

### Venjarar

Finn Johannessen gjørdi hugskotið til veruleika, og hann er eisini høvuðsvenjari hjá FÁB. Hann hevur nógvar royndir sum ungdómsvenjari, og í løtuni er hann venjari hjá smádreingjunum hjá KÍ.

Bill McLeod Jacobsen, Eyðun Klakstein og Jákup Mikkelsen hava eisini verið venjarar hjá FÁB. Teir hava allir royndir sum spælarar og venjarar.

### Stuðlar

FÁB hevur fingið góðan stuðul til virksemið í vetur. Sp/f Kneysur er høvuðsstuðul hjá FÁB. Eisini hava Netto og SportMaster í Klaksvík stuðlað FÁB.

Harafturat hevur Viðareiðis kommuna hevur verið sera beinasom, og Klaksvíkar Ítróttarfelag hevur eisini av tikið væl undir við átakinum.

# Lætt hjá oddinum

**Roknast má við, at øll oddaliðini hjá kvinnunum fáa fult um vikuskiftið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað man neyvan vera tann heilt stóru spenningurin, sum eyðkennir kvinnuligu hondbóltsleikararnar kring landið hetta vikuskiftið.

Tríggir dystir standa á skránni, og í øllum trimum førunum eru tað fremstu liðini, sum taka móti teimum niðastu.

Stjørnan er einasta av hesum, sum hevur heimavøll, tá tær taka ímóti StÍF, meðan VB og VÍF skulu á vitjan hjá ávíkavist Kyndli og Søljuni. Seinastu árini hava víst, at munurin millum topp og botn í kvinnudeildini er stórur, og ivaleyst er hetta ein veruleiki, sum verður staðfestur enn einaferð sunnudagin, tá allir tríggir dystirnir standa á skránni.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur - 1. deild kvinnur**

| Dagf. | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 29.02 | 14.30 | Kyndil-VB | Karsten Joensen & Kristian Joensen |
| 29.02 | 15.00 | Stjørnan-StÍF | Hannis Wardum & Uni Wardum |
| 29.02 | 16.00 | Søljan-VÍF | Kristian Johansen & Sámal Hansen |

**1. deild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 29.02 | 16.00 | StÍF-Neistin | Geir Wardum & Gunnar Gregoriussen |
| 29.02 | 16.00 | VÍF-KÍF | Jákup S. Simonsen & Høgni M. Joensen |
| 29.02 | 16.00 | Kyndil-H71 | Karsten Joensen & Kristian Joensen |

**Flogbóltur - Meistaradeild kvinnnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 29.02 | 14.00 | KÍF-Mjølnir | ÍF |
| 29.02 | 14.00 | TB-Fleyr | ÍF |

**Meistaradeild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 29.02 | 16.00 | Fram-Mjølnir | Fleyr |
| 29.02 | 16.00 | SÍ-ÍF | Fleyr |

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 6 | 5 - 0 - 1 | 481 | 364 | 117 | 21 |
| 2 VB | 6 | 6 - 0 - 0 | 499 | 376 | 123 | 20 |
| 3 VÍF | 6 | 4 - 0 - 2 | 465 | 377 | 88 | 17 |
| 4 Neistin | 6 | 3 - 0 - 3 | 452 | 416 | 36 | 14 |
| 5 StÍF | 6 | 1 - 0 - 5 | 412 | 486 | -74 | 7 |
| 6 Søljan | 6 | 1 - 0 - 5 | 342 | 453 | -111 | 4 |
| 7 Kyndil | 6 | 1 - 0 - 5 | 302 | 481 | -179 | 3 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 4 | 3 - 0 - 1 | 423 | 388 | 35 | 15 |
| 2 Neistin | 4 | 3 - 0 - 1 | 400 | 367 | 33 | 12 |
| 3 StÍF | 4 | 2 - 0 - 2 | 356 | 334 | 22 | 11 |
| 4 VÍF | 4 | 2 - 0 - 2 | 369 | 348 | 21 | 10 |
| 5 KÍF | 4 | 1 - 0 - 3 | 364 | 417 | -53 | 5 |
| 6 H71 | 4 | 1 - 0 - 3 | 341 | 399 | -58 | 4 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 16 | 13 - 3 | 42 | 16 | 26 | 18 |
| 2 TB | 16 | 12 - 4 | 41 | 15 | 26 | 16 |
| 3 Dráttur | 17 | 10 - 7 | 37 | 26 | 11 | 16 |
| 4 ÍF | 17 | 7 - 10 | 25 | 33 | -8 | 10 |
| 5 KÍF | 16 | 6 - 10 | 22 | 39 | -17 | 7 |
| 6 Fleyr | 16 | 1 - 15 | 9 | 47 | -38 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 13 | 11 - 2 | 35 | 9 | 26 | 15 |
| 2 Mjølnir | 12 | 11 - 1 | 33 | 8 | 25 | 15 |
| 3 SÍ | 13 | 7 - 6 | 26 | 21 | 5 | 10 |
| 4 Fram | 13 | 2 - 11 | 10 | 34 | -24 | 2 |
| 5 Fleyr | 13 | 1 - 12 | 5 | 37 | -32 | 2 |

# Ávegis í ánna

ÓHAPP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hósdagin hekk hesin lítli lastbilurin hálvur út av vegnum í Hvalvík.

Sagt verður, at veðrið var ringt í Sundalagnum, tá ið hendingin fór fram. Heimildarmaður okkara sigur, at tað var ein hvirla, sum tók bilin í nógva vindinum og hálkuni.

Tíbetur hendi eingin fólkaskaði.

Hendingin fór fram beint við kirkjuna, og tað var um reppið, at bilurin endaði úti í ánni, sum rennur oman gjøgnum bygdina.

Ein lastbilur hálaði bilin uppaftur.



*Hesin var ávegis í ánna í nógva vindinum og hálkuni í Hvalvík í gjár*
*Mynd: Finnur Justinussen*

# Stór skúlakonsert í Vági

**Sunnudagin klokkan 16 verður stór skúlakonsert í skúlanum í Vági, eftir at tónleikanæmingar og tónleikarar hava havt messingstevnu alt vikuskiftið í Vági. Næmingar úr 8. flokki hava júst fingið ljóðføri innan ásláttur hesa vikuna og taka longu lut í stóru framførsluni**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Rættuligur blástur er komin í seglini hjá Musikkskúlanum í Vági. Ulf Nordlund, tónaleikalærari, hevur farnu mánaðirnar savnað eitt orkestur við børnum, ið leika á ymisk horn. Undirvísingarhátturin er serstakur og gevandi og fyrstu næmingarnir verða valdir út við eini roynd, og síðani koma onnur uppí. Og úrslitini síggjast sera skjótt.

Stórbandið er nú vorðið størri, tí næmingar úr 8. flokkunum eru nú komnir við og leika á ymisk ljóðføri innan ásláttur, slagverk. Eisini her sæst, at tað gongur skjótt framá í undirvísingini, tí hesir næmingar eu júst byrjaðir og hava fingið ljoðførini hesa vikuna, men longu taka teir lut í stóra konserttiltakinum.

Messingstevnan er leygardagin 28. og sunnudagin 29. februar og vant verður báðar dagarnar og so er stór konsert sunnudagin klokkan 16 í Vágs Skúla.

Luttakandi á stevnuni eru Tvøroyrar Hornorkestur, SuðurættinSekstetten og Skúlaorkestrið í Vági. Soleiðis verður brúgv eisini bygd um ættarliðsgjónna, tí ung og eldri leikarar venja saman um vikuskiftið.

Øll eru vælkomin á konsertina í fimleikarhøllini í Vágs Skúla sunnudagin klokkan 16;00.

# Semja undirskrivað um sáttmála

SÁTTMÁLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Havnar Arbeiðskvinnufelag og Fíggjarmálaráðið undirskivaðu, 26. februar, semju um nýggjan sáttmála, sum verður galdandi í tvey ár - frá 1. oktober 2003 til 1. oktober 2005.

Í tíðindaskrivi, sum Fíggjarmálaráðið hevur sent fjølmiðlunum, verður sagt, at karmurin í semjuni er umleið 9%, og at ein lønarhækking er avtalað.

Frá 1. oktober 2003 verður eitt lønarstig eyka við 7 ára starvsaldri, og broyting er eisini gjørd í lønini hjá gongsgentum á seingjardeild.

- Ymiskar broytingar eru eisini gjørdar í sáttmálatekstinum og veitingum í sáttmálanum.

Víst verður á, at avtala er gjørd um serstaka fríviku, og eru 2% av nevnda "karmi" er brúkt til tann partin.

Avtala er eisini gjørd millum partarnar um førleikamenning.

# Mótasýning, sangur og kunning



Øll eru vælkomin á Handilsskúlan á Kambsdali mikukvøldið millum 18 og 22. Næmingar fara at undirhalda við mótasýning, tónleiki og skemti, og lærarar fara at kunna um útbúgvingar og lærugreinir.

Hetta er triðja árið á rað at skipað verður fyri hesum tiltaki, og undanfarin ár hevur tað verið væl móttikið. Næmingar skipa fyri mótasýning, har handlar í umráðnum luttaka. Livandi tónleikur er eisini á skránni umframt skemt.

Lærarar og lestrarvegleiðarar fara í sambandi við tiltakið at kunna um útbúgvingar skúlans og tær lærugreinir, sum eru á einum handilsskúla.

– Endamálið við einum tílíkum kvøldi er at kunna so væl sum gjørligt um skúlan og útbúgvingar skúlans og samstundis geva næmingunum, sum eru á skúlanum møguleika at skipa fyri einum øðrvísi tiltakið, sigur Páll Isholm deildarstjóri á Handilsskúlanum.

Sjálv mótasýningin og tónleikurin verða á skránni millum 19 og 21, og so verður møguleiki at nema sær kunning um útbúgvingar og lærugreinir frá 18 - 19 ella frá 21 - 22.